# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Latið Atlantsflog selja tollfrítt

Fyrradagin beyð nevndin fyri Vága Floghavn út alment raksturin av av virksemi við tollfríum vørum á flogvøllinum í Vágum. Hetta er ein gamal tanki, ið um síðir verður veruleiki. Fleiri hava longu verið á bananum og vilja tryggja sær rættin til hesa sølu, bæði ferðaskrivastova og flogfelag.

Stjórin í Atlantsflog hevur ført fram, at tollfría sølan hjá felagnum er ein týðandi partur av inntøkugrundarlagnum hjá flogfelagnum – og eitt parametur, sum er við til at halda ferðaseðlaprísinum niðri. Um henda søla verður tikin frá flogfelagnum, so er bert ein gongd leið, tað er at tryggja sær hesa inntøku við øktum ferðaseðlaprísum.

Atlantsflog hevur leingi havt ynski um at flyta tollfríu søluna úr flogførunum og niður á jørðina. Hetta fyri at flogførini skulu kunna bera fleiri ferðafólk og fyri at minka um $CO_2$ útlátið pr ferðafólk.

Uttan iva hevur Vága Floghavn fullan rætt at bjóða tollfríu søluna út í fríari kapping. Men vit eiga at hava í huga, at hetta kann verða ein álvarsom hóttan fyri búskapin í føroyskari loftferðslu. Um so er, at onkur annar veitari fær hendan handil um hendi – tað veri seg føroyskur ella útlendskur, so vantar hendan inntøkan í føroyska loftferðslukervinum, og tað kann bara elva til dýrari prísir fyri brúkaran í síðsta enda.

Vit kunnu halda tað vit vilja um okkara ferðafólkaflutningsfeløg og um prísirnar, sum vit altíð halda vera í hægra lagi. Men vit eiga ikki at gloyma, at vit hava eitt føroyskt Atlantsflog og eitt føroyskt Smyril Line – sum við støð í Føroyum megna at røkja alla okkara flúgving og sigling og sum hava útkonkurrerað sterkar útlendskar kappingarneytar. Hetta er ikki øllum beskorið - og virði, sum grannar okkara í Hetlandi, Orkneyoyggjum og Íslandi ikki hava.

Aktørarnir í Vága Floghavn eiga sjálvsagt at samstarva og gera sær dælt av teimum synergium, sum kunnu fáast burtur úr samstarvi. Ein av hesum synergium er at lata Atlantsflog sleppa at flyta tollfríu søluna úr flogførunum og niður á flogvøllin.

**Sosialurin**

## Gráa gullið verður ikki virt í Føroyum

ANNIKA OLSEN
Løgtingskvinna fyri Fólkaflokkin



Nú um dagarnar er varpað ljós á umstøðurnar hjá føroyskum pensjónistum og eru søgurnar ikki tespiligar. Vit hava pensjónistar í hesum landi, ið ikki hava til dagligt breyð. Vit hava pensjónistar, ið ikki hava ráð til at hita sær húsini upp. Vit hava pensjónistar, ið ikki hava ráð til at ganga saman í hjúnarlag. Um vit høvdu hagtøl, ið vísa, hvussu nógv liva undir fátækramarkinum í Føroyum, so hevði óivað nógvir pensjónistar komið undir hesa áseting, men kanska tora vit ikki at síggja skriftina á vegginum, og tískil hava vit ongi tílík hagtøl.

Tað er bæði syrgiligt og pínligt at hoyra um hesu mongu pensjónistar, ið eru so illa staddir, at vit kunnu ikki loyva okkum at lata standa til longur. Tað hjálpir ikki at bíða til 2050, tí tað hava vit lagt mangan pensjónistin í grøvina, orsaka av politiskum maktarloysi. Tað má okkurt henda her og nú. Hækkandi oljuprísir og hækkaðu útreiðslurnar hjá húsarhaldinum eru ikki við til at bøta um viðurskiftini og umstøðurnar hjá pensjónistunum.

Fólkaflokkurin er longu farin til verka til tess at bøta um umstøðurnar hjá føroysku penjónistunum. Ì fyrsta umfari eru tað pensjónistarnir, ið enn eru arbeiðsmarknaðinum, ið Fólkaflokkurin vil veita eina hjálpandi hond. Tað er ein stór andsøgn í tí, at vit gera lógaruppskot fyri at innføra fremmanda arbeiðsmegi, alt íméðan at vit forða teimum føroyingum, ið framvegis hava møguleika og vilja til at virka á arbeiðsmarknaðinum.

Sjálvsagt skal ein pensjónistur hava rætt til at fara á pensjón, tá ið hann fyllir 67. Lívið er eitt res, og tað er heilt náturligt, at fólk hava tørv á at kunna njóta teirra otium. Men framvegis eru tað nógv eldri, ið vilja vera á arbeiðsmarknaðinum eitt sindur longur, og eiga tey at hava rætt og møguleika til tess. Tað eru fleiri góð argument fyri hesum. Tað styrkir tann einstaka fysiskt við at vera virkin hvønn dag, ið er gott fyri likal og sál. Eisini styrkir tað um tann sosiala partin; tí tað er gott at koma út ímillum fólk heldur enn at sita heima í einsemi. Harumframt kann ein pensjónistur geva vitan og førleikar frá sær til yngri starvsfelagar, ið ikki eru so royndir innan eitt ávíst fak ella yrki.

**Tey eldru verða straffaði á arbeiðsmarknaðinum**

Um ein vanligur pensjónistur forvinnur meira enn 54. 000 um árið, verður hann straffaður við at skula gjalda 60 krónur fyri hvørja 100 krónur, hann forvinnur meira enn hesar 54.000. Hetta gevur onga meining serliga í hesum døgum, tá ið vit vanta arbeiðsmegi, og at pensjónistar hava ilt við at fáa endarnar at røkka saman. Eisini verður oljustudningurin tikin burtur um ein pensjónistur forvinnur meira enn 54.000 um árið. Hví skulu fólk straffast fyri, at tey hava hug til at forvinna sær nakrar eyka krónur. Hetta virkar sera marghátttligt, tá ið vit kenna til umstøðurnar hjá føroysku pensjónistunum.

**Mótrokningin í viðbótini skal lækka**

Fyri at bøta um umstøðurnar hevur Fólkaflokkurin lagt eitt uppskot fyri tingið, ið lækkar mótrokningina í viðbótini úr verandi 60 krónum fyri hvønn 100 seðil niður í 30 krónur. Við øðrum orðum at lække marginalskattin úr 60% niður í 30%. Best hevði verið, um markið 54.000 kar. antin varð tikið burtur ella hækkað munandi, soleiðis at ongin mótrokning varð í viðbótini. Fólkaflokkurin vil kanna, um møguleiki er fyri hesum og um ein politisk semja kann finnast um hetta týdningarmikla mál.

Fólkaflokkurin fór uppá val við tí málsetningi, at brúk skal vera fyri øllum, og vit meta sanniliga, at brúk er fyri teimum eldru, ið framvegis hava møguleika og hug til at virka á arbeiðsmarknaðinum. Tað gevur als onga meining at tvinga fólk at seta seg aftur, at straffa tey um tey forvinna sær nakrar eyka krónur. Vit hava tørv á dynamikki og fleksibiliteti á føroyska arbeiðsmarknaðinum heldur enn stringentar reglur og mannagongdir, ið drepa alt virkisfýsni. Hetta er tíverri sum í mongum øðrum lutum galdandi í Føroyum, og tað er uppá tíðina, at vit politikarar gera skipanir, ið eru fleksiblar á øllum stigum.

## Mótmæli og avsanning

HØGNI HOYDAL



Undirritaði skal hervið staðiliga avsanna tær grovu ákærur og ósonnu søgur, sum Sosialurin, Portalurin og Rás2 bera fram ímóti mær í dag.

Havi fingið mangar lygisøgur omanyvir meg í mínum politiska virki, men hendan ber av øllum.

Eg havi hvørki gjørt meg inn á nakran ella nakað í Tinganesi.

Var uppringdur av blaðmanni á Sosialinum í dag og segði, at eg greitt kundi afturvísa slatrisøgum um meg og sjálvandi ikki vildi gera aðrar viðmerkingar til slíkt. Kortini velur Sosialurin at prenta ósannindir og útspilling av mær á henda hátt og siterar meg fyri onga viðmerking at hava, og at eg hvørki vil vátta ella avsanna hesi ósonnu tíðindi.

Tí mundi eg satt at siga dottið uppeftir, tá eg í kvøld eftir ein strævnan arbeiðsdag lesi og hoyri tey ósannindi, sum omanfyrinevndu miðlar leggja meg undir vísandi til ónevndar keldur.

Her er talan um eitt nýtt lágmark í fjølmiðlaflutningi.

## Viðmerking til Høgna Hoydal

Ilt er at vita, hvat Høgni Hoydal meinar. Tí tað einasta hann segði, tá vit bóðu hann um viðmerking til málið var, at hann "*ikki kundi gera viðmerkingar til slíkt slatur og sleyg, og tá ið vit hoyra slíkar søgur, máttu vit venda okkum til embætisfólkini, tí talan var ikki um eitt politiskt mál*".

Marjun Hanusardóttir váttaði, at "kontrovers er um skrivstovur".

Síðani greinin var í blaðnum, hava vit fingið at vita frá fleiri keldum, at rættiliga álvarsamt stríð er millum løgmann og Høgna Hoydal um hølisviðurskifti í Tinganesi.

Tað frætta vit meira um, tá vit hava fingið alment innlit í málið.

**Blaðstjórnin**

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støddir:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.